Viðmerking:

Hans Eli Hansen ráðgevi í enskum og týskum skrivar:

Tungt at vera ráðgevi í fólkaskúlanum, tá fyrisiting og politikarar ikki fylgja okkara ráðum

Hetta er ein frágreiðing til skúlanevndir, læraraar, foreldur og næmingar um stríðið um nýggju fólkaskúlalógina

Tá arbeitt varð við álitinum um nýggja fólkaskúlalóg í 1996-97 sendi landsstýrið álitið til ráðgevararnar í fólkaskúlanum til ummælis. Nú tá fólkask´lin liggur lamin, tí stríð hevur tikið seg upp millum Føroya Lærarafelag og landsstýrið um nýggju fólkaskúlalógina - kom eg at hugsa um tær viðmerkingar, sum eg sendi Landsstýrinum (avrit varð sent Føroya Lærarafelag) men eg má bara siga, at tungt er at arbeiða sum ráðgevi, tá fyrisiting og politikarar ikki fylgja okkara ráðum.

Brævið, sum eg sendi landsstýrinum, var soljóðandi:

Tórshavn 15.02.97

Føroya Landsstýri
att: Eilif Samuelsen, landsstýrismaður
Boks 64
FO-110 Tórshavn

Viðvíkjandi: Álitið um nýggja fólkaskúlalóg

Undirritaði er ráðgevi hjá Landsskúlafyrisitingini og Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð fyri hevur fingið álitið um nýggja fólkaskúlalóg sendandi til ummælis. Eg eri biðin um at gera mínar viðmerkingar til uppskotið og senda tær til landsstýrismannin í Undirvísingarmálum áðrenn 17. februar 1997.

Álitið um nýggja fólkaskúlalóg er sera áhugavert og inniheldur eisini ymsa spennandi nýhugsan, men eg haldi, at tíðin til at viðgera álítið í hevur verið alt ov stutt, og kann hetta koma okkum aftur um brekku. Tí haldi eg, at vit áttu at givið okkum meira tíð so lærarar, skúlanevndir, foreldur og politikarar kundu viðgjørt álitið meira gjølla, og so sett lógina í gildi um 3-5 ár.

Líta vit aftur um bak og hyggja at, hvussu tær ymisku skúlalógirnar hava roynst, so hava tær eitt felags eyðkenni: **Tann fíggjarligi karmurin hevur ikki verið í læi, tá lógirnar hava verið settar í gildi.** Hetta hevur m.a. fört við sær, at lærarar og næmingar koma í klemmu, tí hóskandi læribøkur, undirvísingaramboð, tól og hølir hava ikki verið til taks í neyðugan mun. Harafturat hava møguleikarnir at eftirútbúgva lærarar eisini verið ov vánaligir.

Vit hava júst havt eitt tógvi stríð fyri at fingið skúlarnar til at gjørt lesiætlanir eftir galdandi lóg og fáa vit nú eina nýggja skúlalóg, so skal alt endurskoðast um aftur. Hetta er sera óheppi, og kostar eisini pening.

Fyri fáum árum síðani hevur Lesiætlanarnevndin gjørt eitt megnar arbeiði við at útgeva bøkurnar Fólkaskúlin, almenni parturin og Fólkaskúlin, yrkisligi parturin. Báðar bøkurnar eru út frá galdandi skúlalóg, og tí er tað sera óheppi longu nú at fara at gera broytingar. Hetta kostar eisini pening.

Føroya landsstýri arbeiðir júst við einum uppskoti um eina kommunusamanlegging. Tað kann tí henda, at skúlaøkini verða broytt um stutta tíð. Tí hevði verið betur, um kommunusamanleggingin varð framd, áðrenn vit fingu eina nýggja skúlalóg.

Danir hava júst fingið eina nýggja skúlalóg. Áðrenn lógin kom í gildi var ein nevnd undir »Folkeskolerådet« sett til at gera eina kanning um m.a. »at vurdere den nye folkeskolelov og de kommende læseplaners krav til undervisningens indhold og arbejdsformer«. Kanningin vísti, at nýggja fólkaskúlalógin kom at kosta umleið 10 milliardir krónur fyri stat og kommunur.

Í Føroyum er **ongin** kanning gjørd fyri at vita, hvat ein nýggj fólkaskúlalóg kostar, um vit skulu liva upp til krøvini í nýggju lógini. Tær føroysku kommunurnar hava ongantíð í nýggjari tíð verið so illa fyri fíggjarliga sum beint nú og sitandi landsstýrir hava kappast um at seta stórar sparingar í verk á skúlaøkinum. Tí bendir alt á, at hvørki landsstýrið ella kommunurnar hava avsett nakran pening til eina nýggja skúlalóg.

Samanumtikið meti eg, at vit áttu at givið okkum betri tíð til at viðgera nýggja álitið og so um nøkur ár – tá vit vónandi verða fíggjarliga betur fyri - at fingið eina nýggja skúlalóg, soleiðis at vit ikki aftur hesa ferð gera sama feil, sum vit hava gjørt fleiri ferðir áður.

Vinarlig heilsan
Hans Eli Hansen
lærigreinaráðgevi

Hvørki politikkarar ella fyrisitingin lurtaðu eftir okkara ráðum – tað var spell, tí **onki** forðaði fyri, at vit góvu okkum meira tíð til at fyrireika lógina, og so kundu vit sett hana í gildið um nøkur ár, tá ráðini vóru betur.

Til samráðingar við ongum meiriluta

Fríggjadagin upprann so dagurin, tá landsstýrið við fullari manning fór til Danmarkar at samráðast um loysingina úr ríkisfelagsskapinum.

Líka síðani verandi samgonga sá dagsins ljós, hevur hon havt eittans mál á skránni, og tað er loysing.

Búskapurin í óvissu

Búskaparligu avleiðingarnar av hesi ætlan landsstýrissins liggja í óvissu. Einasta boð,ið landsstýrið hevur á tí økinum er, at teir ynskja so langa skiftistíð sum gjørligt.

Meðan danskir politikarar siga við Útvarp Føroya, at skiftistíðin fer at verða ímillum 3 og 5 ár, so droymir landsstýrið framvegis um 15, 20, ja helst 30 ár. Henda langa skiftistíð skal so tryggja vælferðina í Føroyum. Men hvat hendir við vælferðini, um skiftistíðin verður stytri enn 5 ár ?

Stórt afturstig

Vit vita, at minkandi ríkisveitingar fara at hava við sær, at vælferð og livikor føroyinga verða fyri stórum afturstigi. Hetta er ein gongd, sum føroya fólk á ongan hátt eiga at taka undir við, men arbeiða hart ímóti.

Fullveldisætlanin hevur verið marknaðarført sum ein verkætlan, ið byggir á nakrar heilt órealistiskar væntanir og vónir um, hvussu bjart alt verður, um bert vit fáa fullveldi. Men hetta er á ongan hátt nakað haldgott støði at grunda ein nýggjan búskap á.

Eingin meiriluti

Føroya Landsstýri, sum nú er farið til Danmarkar at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum, hevur ikki meiriluta aftanfyri seg.

Í Uttanlandsnevndini er samgongan í minniluta, og fekk landsstýrið haðani bara minnilutatilráðingar. Sambært seinastu veljarakanning, hava samgonguflokkarnir eisini minnilutan av Føroya fólki aftanfyri seg, men kortini fara hesir garpar avstað at spæla hasard við Føroya fólki.

Dýrt fyri føroyingar

Ríkisveitingarnar skulu burtur, lesandi føroyingar í Danmark skulu javnstillast við normenn, sviar og íslendingar, og koma ikki at hava tann framíhjárætt, sum ríkisfelagsskapurin gevur.

Livistøðið í Føroyum skal lækka 25 %, samstundis sum vit standa fyri at gera íløgur fyri yvir milliardina. Sjúkrahúsverkið er niðurslitið. Almannaverkið livir ikki upp til tann tørv, sum samfelagið hevur. Strandferðslan liggur lamin um stutta tíð, tí skipini eru niðurslitin. Á skúlaøkinum skulu stórar íløgur gerast, fyri ikki at tosa um munandi størri rakstur. Okkara høvuðsvinna, fiskiflotin, klárar ikki at endurnýggja seg. Okkara gomlu og komandi ættarlið merkja dag og dagliga, hvussu núverandi samgonga tekur sær av løttum á hesum øki. Soleiðis kundi ein hildið fram, alt meðan henda samgongan hevur brúkt alla orku, og milliónir av peningi til fullveldisætlanina, fyri at nøkta tørvin hjá onkrum ørvitisknokki, sum hevur mist jørðforbindilsi.

Hvør hevur givið samgonguni loyvi til alt hetta, uttan fyrst at spyrja føroya fólk eftir ? Føroyingar kunnu einans føla seg ótryggar við støðuna, tí hava vit fyrst loyst, er ringt at koma afturumaftur og siga, at vit meintu einki við tað.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin besta boð

Besta boð um eina skilagóða avtalu, er tað frá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum í Uttanlandsnevndini, har málið er ein samstarvsavtala innanfyri ríkisfelagsskapin. Flokkarnir viðurkenna, at ríkisfelagsskapurin er ein týðandi partur av grundarlagnum undir okkara vælferðarskipan, men at arbeiðast skal framhaldandi ímóti búskaparligum sjálvbjargni, har vælferðin verður varðveitt og ment.

Bert á tann hátt kann skútan fáast aftur á rætta kós. Men hetta kann einans gerast við dyggum stuðuli frá Føroya fólki.

Heðin Mortensen
løgtingsmaður

NÝTT TELEFONNUMMAR
3-arin hevur fingið nýtt telefonnummar:
3 x 35

- og nýtt telefaxnummar
35 35 36
3arin
UR GULL SILVUR
FOTO & VIDEO
FLØGUR
SMS · Tel 35 35 35 · Tax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo
SABRIR · TEL 355 355

KEYPIÐ SUMMARDEKKINI NÚ
KUMHO DÁCK
ES
P/f Esmar Simonsen
Kambsdalur • Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29 • E-mail: es@es.fo

Sosialurin - 311820

Toyota Corolla 1,6 Sedan Terra
við skaða til sølu fyri hægsta boð
Skrás.: 18-08-98 • Km.: 34.000
REYNI SERVICE

Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820

ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini um ítróttin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

Tórsvallarmálið:

Spurningur um raðfesting

Tórfinn Smith, býráðslimur og limur í mentunarnevdini, heldur spurningin um rennibreyt ella ikki á Tórsvølli vera ein spurning um raðfesting av kommunalu íløgunum

Tórfinn Smith: Býráðið noyðist at raðfesta íløgurnar í kommununi

JÁKUP MØRK

Í farnu viku skrivaðu vit her á blaðnum, at Heðin Mortensen, býráðslimur og ein av stigtakurunum til Tórsvallarverkætlanina, hevði í hyggju at leggja fram uppskot um, at Tórshavnar Býráð skuldi yvirtaka verkætlanina.

Í sama viðfangi harmaðist hann um, at mentunarnevndin hjá býráðnum hevði gjørt tilmæli, har teir frráddu at lata rennibreyt gera á Tórsvølli.

Hetta metti Heðin Mortensen vera einki minni enn ein katastrofa, tí Býráðið við hesum so at siga tók lívið av frælsu ítróttini.

Kunnu ikki gera alt í senn

Tórfinn Smith, býráðslimur, sum hevur sess í mentunarnevndini, sigur við Sosialin, at størsta orsøkin til, at mentunarnevndin mælti til, at rennibreyt ikki verður gjørd á Tórsvølli, eru væntandi pengar.

Hann vísur á, at Tórshavnar Kommuna hevur ein samlaðan íløgukarm upp á 60 mió.kr., har av 28 mió.kr. verða nýttar til Tórshavnar Havn. Av hinum 32 mió.kr. eru á leið ein triðingur settar av til ger av ítróttarhøll í Hoyvík, og so heldur hann spurningin vera, um býráðið kann loyva sær at játta enn meira pening til ítróttina.

Víðari sigur Tórfinn, at smb. teimum upplýsingum, sum hann hevur móttikið í málinum, er kostnaðurin av eini rennibreyt uml. 9 mió.kr. og at hetta er ein somikið munandi upphædd, at hon ikki verður goldin av sær sjálvari.

Sjálvur heldur hann, at tað eru nógvir aðrir lutir í kommununi, sum eisini tørva íløgur, og tí botnar alt í royndveru í, at íløgurnar skulu raðfestast. Eitt nú vísur hann á, at ein stórur trupulleiki í kommununi er barnaansingin, har tað í løtuni eru eini 400 børn á bíðilista, og at hetta í hansara verð er ein nógv meira akuttur trupulleiki.

- Vóru pengarnir nóg nógvir, so var eingin trupulleiki, tí so kundu vit bara fara undir at gjørt alt tað arbeiði, sum tørvur er á. Trupulleikin er bara, at alt er ikki somikið einfalt, sigur Tórfinn Smith.

Hann afturvísur eisini, at mentunarnevndin við tilmælinum skal hava tikið lívið av frælsu ítróttini í høvuðsstaðnum. - Í tilmælinum vísa vit eisini á, at møguleikarnir fyri at gera rennibreyt aðrastaðni í høvuðsstaðnum skulu kannast, sigur Tórfinn, sum samstundis vísur á, at umsitingin í býráðnum longu hevur gjørt ein part av hesum kanningararbeiði.

Hvørt sítt mál

Spurdur hvørt hann tekur undir við Heðini Mortensen, tá hesin sigur, at einasti hátturin at fáa Tórsvøll lidnan er, at kommunan yvirtekur verkætlanina, sigur Tórfinn fyrst og fremst, at her skal ansast eftir, at alt ikki verður vavt saman.

Ein spurningur er, um rennibreyt skal gerast ella ikki, og hin er, um kommunan skal yvirtaka verkætlanina.

Hann vísur annars á, at býráðið í sínari tíð samtykti at seta grunnin á stovn, júst fyri at skott skuldi vera ímillum Tórsvøll og Tórshavnar Býráð, og at tað tískil kann tykjast løgið, um býráðið nú vil yvirtaka verkætlanina.

Víðari sigur hann, at eftir hansara tykki eigur grunnurin nú at fáa frið at arbeiða víðari við ætlanini, og tað er púra greitt, at hetta arbeiðið kemur at taka tíð.

Um so er, at grunnurin ikki hevur fíggjarligu orkuna til at gera arbeiðið liðugt, er eingin forðing fyri, at kommunan spýtir meira pening í ætlanina, uttan at hetta merkir, at kommunan yvirtekur verkætlanina. Tórfinn vísur tó samstundis á, at líkamikið hvørja loysn býráðið velur, so botnar alt í einum spurningi um at raðfesta íløgurnar, og har er spurningurin um ein fótbóltsvøll og/ella rennibreyt at kalla eitt luksusproblem eftir hansara tykki.



Smb. Heðini Mortensen er økið kring Tórsvøll ein skomm fyri Havnina

Fluttur dystur

Dysturin millum StÍF og Kyndil verður leiktur á Skála í kvøld

JÁKUP MØRK

Fyrstu deildar dysturin millum StÍF og Kyndil, sum eftir ætlan skuldi verða leiktur leygardagin, er nú fluttur til í kvøld, mikukvøldið, klokkan 19.00.

Beint eftir hetta spæla aðru deildar liðini hjá somu feløgum.

Alt á einum stað

StÍF hevur sum kunnugt longu tryggjað sær bronsumerkini í landskappingini, og tískil er dysturin móti Kyndli uttan týdning fyri endaligu støðuna í landskappingini.

Bronsumerkini verða tó ikki handað á Skála mikukvøldið.

Ístaðin verða øll heiðursmerkini handað í Ítróttahøllini í Vestmanna, eftir at gulldysturin millum VÍF og Neistin er leiktur.

Vilja hava arbeiðsfrið

Poul Michelsen sigur við Sosialin, at nevndin í Grunninum fyri Tórsvøll alla tíðina hevur arbeitt eftir samtyktu ætlanini, og at hetta arbeiði heldur fram, um tað er tað, sum býráðið vil

Poul Michelsen: Býráðið má siga, hvørjar ætlaninar eru við Tórsvølli

JÁKUP MØRK

Poul Michelsen, formaður í Grunninum fyri Tórsvøll, sigur í stuttari viðmerking til Sosialin, at nevndin í grunninum alla tíðina hevur arbeitt eftir upprunaligu verkætlanini.

Hann leggur dent á, at sambært teirri umsókn, sum í sínari tíð varð latin býráðnum, skuldi arbeiðið gerast, so hvørt sum pengar vóru tøkir, og í so máta er einki broytt hesum viðvíkjandi.

Arbeiða eftir vilja býráðsins

Hetta innibar so, at eingin rennibreyt skuldi gerast í fyrsta umfari. Um støðan broytist, soleiðis at ein rennibreyt skal gerast í hesum byggistignum, so er hetta ikki í tráð við upprunaligu ætlanina, og so má arbeiðshátturin broytast, heldur Poul Michelsen.

Víðari sigur hann, at orsøkin til, at arbeiðið viðvíkjandi vøllinum í løtuni koyrir við niðursettari ferð, er, at teir ikki eru vísir í, hvørjar ætlaninar eru við vøllinum.

Formaðurin í grunninum vísir eitt nú á, at næsta stig teirra er at gera eitt inngongina til vøllin lidna, men vísur í sama viðfangi á, at hetta veldst um, hvørt rennibreyt skal gerast ella ikki. - Skal rennibreyt gerast nú, er talan um arbeiði fyri einar 500 - 600 tkr., sum síðani skal takast niður aftur, og hetta eru ov nógvir pengar at nýta til onga nýttu, vísur hann á.

Í sama viðfangi leggur hann dent á, at nevndin í grunninum ikki á nakran hátt hevur ætlanir um at mótarbeiða býráðnum, sum eigur grunnin.

- Tað er jú Tórshavnar Kommuna, sum eigur grunnin, og tískil kunnu vit ikki gera annað enn, at arbeiða eftir teirra vilja, sigur Poul Michelsen, sum samstundis vísir á, at tað skapar óneydugar trupulleikar, tá aðrar meiningar brádliga koma frá býráðnum ella portum av hesum.

Tískil bíðar nevndin nú eftir, at býráðið greitt meldar út, hvørjar ætlaninar eru við grunninum, soleiðis at nevndin kann arbeiða víðari.

Annars heldur Poul Michelsen, at tað eftir hansara tykki tykist løgið, at Heðin Mortensen, nú skal koma við hesum ætlanunum.

- Hann hevur sjálvur sitið í nevndini, og hevur tá havt allar møguleikar at gjørt vart við síni sjónarmið, men har er einki uppskot nakrantíð komið frá hansara síðu. At hann nú hevur eina greiða støðu í málinum, er sostatt bara at gleðast um, sigur Poul Michelsen.

Yvirtøka verður dýrari

Annars heldur Poul Michelsen lítið um tær ætlanir, sum Heðin Mortensen hevur, um yvirtøku av vøllinum.

- Einasta, sum býráðið fær burtur úr hesum, er, at raksturin av vøllinum gerst dýrari, heldur Poul fyri. Víðari sigur hann, at raksturin av vøllinum í dag er so at siga ókeypis, tí nærum alt verður gjørt sjálvboðið. Skal býráðið yvirtaka verkætlanina, noyðast teir eisini at gjalda løn fyri alt hetta.

Harumframt vísur formaðurin á, at liðugtgerðin av vøllinum fer at kosta tað sama, líkamikið um býráðið ella grunnurin stendur fyri hesum arbeiði.